Mærsk Air flogfraktrutu

Ætlanin hjá Mærsk er at flúgva úr Danmark til Føroyar vi› farmi og sí›ani flúgva vi› fiski úr Føroyum til meginlandi, skrivar Vinnuhúsi›

Vinnuhúsi› skrivar, at sum ein avlei›ing av Fiskivinnutinginum, sum Føroya Ráfiskakeyparafelag skipa›i fyri í oktober um flutning, fyrireikar Mærsk Air nú eina flogfraktrutu millum Føroyar og meginlandi, eina ella tvær fer›ir um vikuna. Ætlanin hjá Mærsk er at flúgva úr Danmark til Føroyar vi› farmi og sí›ani flúgva vi› fiski úr Føroyum til meginlandi.

Ta› er enn ikki avgjørt hvar á meginlandinum farmaflogfari› skal flúgva og hvønn dag í vikuni, men hetta ver›ur væntandi avgjørt í næstum.

Loftvegis flutning

Á Fiskivinnutinginum í Nor›urlandahúsinum kom fram, at feskur fiskur úr Føroyum ikki hevur so gott or› á sær á markna›inum. Hetta kann merkja, at føroyskir útflytarar, sum ætla sær at royna loftvegis flutning av feskum fiski, mugu brynja seg vi› toli, tí ta› kann ikki væntst, at keyparin vi› ta› sama vil gjalda fyri teir eginleikar, sum vøra flutt vi› flogfari hevur framum a›ra vøru.

Føroyingar sum arbei›a uttanlands og vanliga keypa feskan fisk, sum er fluttur vi› flogfari úr Íslandi siga, at til ber at fáa sera gó›an prís fyri feskan fisk vi› gó›ari gó›sku og ein hægri prís enn føroyingar vanliga fáa fyri feskan fisk.

Megna føroyingar at veita keyparnum á meginlandinum feskan fisk tvær ella tríggjar fer›ir um vikuna í mun til einafer› sum nú, er eingin ivi um, at keyparin heldur vil lata ein hægri prís fyri vøruna, skrivar Vinnuhúsi›.

Føroyar hægstu minimumsløn

Íslendskir arbei›sgevarar rinda ikki eftirløn til arbei›arar, me›an norskir arbei›sgevarar rinda Nkr. 200,- um mána›in í eftirløn, skrivar Vinnuhúsi›

Vinnuhúsi› hevur eina kanning á hemasí›uni, sum vísir, at Føroyar hevur hægstu minimumsløn. Sum skilst rinda íslendskir arbei›sgevarar ikki eftirløn til arbei›arar, me›an norskir arbei›sgevarar rinda Nkr. 200,- um mána›in í eftirløn.

Tali› er ikki vi› í talvuni, men ta› broytir ikki ra›festingina. Minimums løn var› innførd í UK í 1999, men í einstøkum førum er lønin enn lægri enn minimumslønin.

Seminar

Fyri 14 døgum sí›ani helt TK-stovan eitt seminar um bonus lønir, sum eru vanligar nógva sta›ni rundan um okkum.

Á fundinum kom fram, at ein av megin orsøkunum til, at slíkar skipanir ikki eru so vanligar í Føroyum sum í grannalondunum, er júst tann, at høga minimumslønin er ein for›ing fyri slíkum.

Talvan vísir minimumslønina í donskum krónum í ávísum londum ár 2000 galdandi fyri arbei›arar:

Land	Tímaløn	Eftirløn	Tilsamans
Ísland	41,41		41,41
UK	45,88		45,88
Grønland	63,84	1,98	65,10
Noreg	79,19		79,19
Danmark	82,40	4,2	85,86
Føroyar	83,72	3	86,23

Yvirtaka trygdina á sjónum

Løgtingi› tekur undir vi›, at landsst‡ri› tekur upp samrá›ingar vi› donsku ríkisstjórnina um yvirtøku av málsøkinum trygd á sjónum, skj‡tur Jørgen Niclasen upp í uppskoti

LÓGARUPPSKOT
Ólavur í Beiti



Jørgen Niclasen, landsst‡risma›ur

Í vi›merkingunum til uppskoti› um at yvirtaka trygdina á sjónum, grei›ur Jørgen Niclasen frá, at landsst‡rissamgongan hevur í samgonguskjalinum ásett, at Skipaeftirliti› ver›ur yvirtiki›.

Í oktober 1998 var› nevnd sett vi› umbo›um fyri Fiskimálast‡ri›, sjóvinnufeløg og danska Sjófer›slust‡ri› vi› tí arbei›ssetningi at lata landsst‡rismanninum í fiski- og sjóvinnumálum eina kanning av teimum málsøkjum, sum føroysk løgtingslóg skal gerast fyri, herundir eitt tilmæli, og tann 12. september í ár kom tilmæli› og uppskot til løgtingslóg um trygd á sjónum.

Øll sjóvinnumál

Nevndin mælir m.a. til: At samrá›ingar ver›a tiknar upp vi› donsku stjórnina um yvirtøkuna og møguligar treytir, solei›is sum rokna› var› vi› í 1988 og 1998. At spurningurin um føroyska umbo›an í IMO eigur at ver›a loystur í sambandi vi› yvirtøkuna. At eftir loknar samrá›ingar ver›ur lógaruppskoti› endursko›a› um ney›ugt og lagt fyri Løgtingi›, eftir at ta› hevur veri› sent til hoyringar hjá vi›komandi myndugleikum, felagsskapum og vinnuumbo›um.

– Ta› er ætlanin landsst‡risins at fáa hesar samrá›ingar í lag skjótast gjørligt, og so skjótt samrá›ingarnar eru loknar, at leggja máli› aftur fyri Løgtingi›, saman vi› endaligum uppskoti til løgtingslóg um trygd á sjónum, sigur Jørgen Niclasen.

Jørgen Niclasen leggur dent á í vi›merkingunum, at vi› yvirtøku av málsøkinum trygd á sjónum ver›a øll sjóvinnumál undir føroyskari lóggávu og umsiting, herundir eisini vitaverk, ve›urtænasta og farvatnsuppmerking.

Mett ver›ur, at árligi kostna›urin av yvirtøkuni av málsøkinum trygd á sjónum ver›ur 18 mió. kr., herundir vitar, ve›urtænastan og farvatnsuppmerking.

Húski vi› børnum hava trong kor

Tá talan er um at veita skattalætta til einstaklingar, ella løntakarabólkarnar, tykist at skorta vi› viljanum hjá landsst‡rinum og samgonguni, siga tingmenninir Vilhelm Johannesen, Lisbeth Petersen og Flemming Mikkelsen vegna Javna›arflokkin og Sambandsflokkin

Vilhelm Johannesen

Lisbeth Petersen

Flemming Mikkelsen

POLITISKT UPPSKOT
Ólavur í Beiti

Tingmenninir Vilhelm Johannesen, Lisbeth Petersen og Flemming Mikkelsen vegna Javna›arflokkin og Sambandsflokkin, hava nú lagt uppskot fram um skattalætta, og siga uppskotsstillararnir í vi›merkingunum, at fyrst í nítiárunum hækka›i samla›a avgjalds- og skattatr‡sti› rættiliga nógv. Vit fingu lógina um meirvir›isgjald. Gjaldi› til Arbei›sloysisskipanina var› sett til 2,75 prosent. Vit fingu fíggjarognaravgjald. Vit fingu fyrst eykaskatt og seinni fingu vit eisini eyka-eykaskatt, i› ikki bara rakti tær høgu inntøkurnar, men eisini tær hægru mi›alinntøkurnar.

– Sí›ani mi›skei›is í nítiárunum eru nakrar broytingar gjørdar, sum hava lækka› naka› um avgjalds- og skattatr‡sti›. Inngjaldi› til ALS er lækka›. Lógin um fíggjarognaravgjaldi› er sett úr gildi. Frá 1. januar 1996 var› tann fyrsti beinlei›is skattalættin givin. Her var talan um ein samla›an lætta, i› kosta›i landskassanum umlei› 100 mió. kr. Ávísur skattalætti er eisini givin sí›ani tá. Og eftir uppskoti frá andstø›uni er aldursmarki› fyri barnafrádrátt flutt frá 16 upp til 18 ár.

Men hóast hetta, so halda uppskotsstillararnir, at lág- og mi›alinntøkurnar, eins og húski vi› børnum, framvegis hava trong kor.

– Í seinastu tingsetu lækka›u landsst‡ri› og samgongan partafelagsskattin, i› var 27 prosent, ni›ur í 20 prosent. Hetta var ein munandi skattalætti til peningastovnarnar, tryggingarfeløgini, advokatskrivstovurnar, grannsko›aravirkini og onnur, sum reka egi› virki vi› einum partafelag ella einum smápartafelag, men tá talan er um at veita skattalætta til einstaklingar, ella løntakarabólkarnar, tykist at skorta vi› viljanum hjá landsst‡rinum og samgonguni, ver›ur sagt í vi›merkingunum.

Reypa› ver›ur dúgliga

Og vísandi til, at landskassin nú ár um ár hevur stór avlop, sum dúgliga ver›ur reypa› um, og at livikorini hjá lág- og mi›alinntøkunum og teimum, sum hava børn undir 18 ár, framvegis eru sera trong, mæla Javna›arflokkurin og Sambandsflokkurin til at veita ein skattalætta, i› samanlagt er mettur at kosta landskassanum 84 mió. kr.

Og Javna›arflokkurn og Sambandsflokkurin skjóta upp at broyta skattastigan í landskattinum fyri lág- og mi›alinntøkurnar. Hetta er mett at kosta 58 mió. kr. Eisini ver›ur skoti› upp at hækka barnafrádráttin í landsskattinum úr 4.000 upp í 6.000 kr. Hetta er mett at kosta 26 mió. kr.

Og enda siga uppskotsstillararnir fyri Sambandsflokkin og Javna›arflokkin at flokkarnir fara at leggja onnur uppskot fram, sum hava til endamáls at lætta um hjá teimum, sum ringast eru fyri, m. a. er talan um at hækka serliga pensjónistafrádráttin í skattinum og at lække serliga avgaldi› á brenniolju.

- Ta› er púra vist, at Dúgvan fer ikki aftur í sigling mikudagin, men vit vita ikki enn, nær ska›in er umvældur, seg›i Magnus Magnussen, tekniskur lei›ari á Strandfer›sluni, á middegi í gjár. Mynd: Edvard Joensen

Óvissa um Lorvíksfjar›arlei›ina

Dúgvan ver›ur ikki klár at taka siglingina upp aftur í dag, og Strandfer›slan fer tí at brúka Smyril um Lorvíksfjør› komandi dagarnar

SAMFER‹SLA
Ey›un Klakstein

Nor›oyingar royna at klára seg sum frægast, me›an Dúgvan ver›ur umvæld á Skipasmi›juni á Skála.

Framvegis er ógreitt, nær Dúgvan kemur aftur í sigling, og Strandfer›slan ætlar at brúka Smyril í siglingini í dag og í morgin.

Stutt eftir klokkan 12.00 í gjár kom Smyril til Klaksvíkar, og hann skuldi sigla tveir túrar millum Klaksvík og Fuglafjør› í gjár, umframt at ein túrur var millum Klaksvík og Havnina.

Hetta lat seg gera, tí Smyril vanliga liggur allan t‡sdagin í Havn, men mikudag siglir Smyril ein túr millum Havnina og Vág seinnapartin.

Strandfer›slan avgjørdi í gjár at taka Smyril úr siglingin til Su›uroyar seinnapartin í dag, og ísta›in seta Smyril inn aftur í siglingina um Lorvíksfjør›.

Royndu at tetta

Seinnapartin í gjár skuldi Dúgvan sleipast á Skála, har umvælingin skal gerast.

Orsøkin til, at Dúgvan framvegis lá í Lorvík fyrrapartin í gjár, var, at menn royndu at tetta lekan sum frægast, fyri at ska›in ikki skuldi gerast størri, tá Tjaldri fór at sleipa Dúgvuna.

Dúgvan skuldi í dokk í gjárkvøldi›, og so skuldi ska›in kannast, og avger› takast um umvælingina.

– Ta› er púra vist, at Dúgvan fer ikki aftur í sigling mikudagin, men vit vita ikki enn, nær ska›in er umvældur, seg›i Magnus Magnussen, tekniskur lei›ari á Strandfer›sluni, vi› Sosialin á middegi í gjár.

A›rir bátar hava siglt

Í vánaliga ve›rinum mánadagin kundi Strandfer›slan einki skip seta í sigling um Lorvíksfjør›, eftir at hol var komi› á Dúgvuna stutt fyri middag.

Tveir línubátar úr Klaksvík vóru ein túr um Lorvíksfjør› seinnapartin mánadagin, og fyrrpartin í gjár gjørdu bæ›i Barsskor og Alpha Pilot túrar um Lorvíksfjør›.

Smyril, sum vanliga liggur meginpartin av t‡sdegnum í Havn, skuldi seinnapartin í gjár gera tveir túrar millum Klaksvík og Fuglafjør›, og vi› ymsum skipum og bátum, skiftandi og broyttum tí›um royna nor›oyingar og onnur, sum brúka farlei›ina um Lorvíksfjør›, at klára seg sum frægast.

Kvinnupolitisk kvøldseta á Gamla Meiarínum

Fríggjakvøldi› 17. november skipar Kvinnufelagi› fyri kvinnupolitiskari kvøldsetu á Gamla Meiarínum í Havn.

Kvinnulig valevni úr øllum flokkum fara at leggja sínar hugsjónir fram. Or›askifti ver›ur millum valevnini, spyrjipanel og áhoyrarar.

Kvinnufelagi› vil vi› hesum lata lívsroyndir kvinnunnar koma samfelagnum til gó›ar.

Eisini ver›ur undirhald vi› Biritu, Súsonnu og Riu. Aftaná ver›ur høvi at keypa sær ein drekkamunn og fáa eitt prát vi› luttakararnar.

Sp/f Inntech
Í dag kl. 10.00
lata vit upp nýggjan handil
í Saltangará
við nógvum ymiskum vørum
V.H.S
hevur alt innan vatn,
hita og sanitet
Variant
hevur alskins gávur
Vøggan
hevur hópin av barnaútgerð
Tel. 449588 • Fax 449499